

Valravn er ein bólkur við nógvari framferð. Løgini á fløguni hava eitt feitt bland millum tað elektriska og tað akustiska. Bólkurin meistrar hesa samanrenning fullkomiliga.

Tónleikurin hjá Valravn er ein samanrenning millum elektro og folk/rokk. Akustisk ljóðførið, elektriskir syntar og droymandi og harðligi sangurin hjá Onnu Katrin geva ein heilt serligan dám, sum er væl dokumenteraður á "Koder på snor". Ljóðið, sum tey skapa saman er eitt nútímans norðurlendskt ljóð, sum vit kanska kenna aftur frá eitt nú Bjørk.

Bólkurin hevur spælt víða um á Evropisku tónleikapallunum- eitt nú í Norra, Týsklandi, Finnlandi, Hollandi, Fraklandi og Sveis.

## Stokkhólmssyndromið – 200

**Fólkakæru loysingarpunkararnir góvu út "Stokkhólms-syndromið" fyrr í ár. Bólkurin er trúgvir móti 200 konseptinum, og útgávan er lekkur og skitin í senn.**



Hvør bestemmar í Leoland? 200 eru aftur har teir eru bestir. Teir punka við einum glimti í eygunum, og tað klæðir teimum. Týtti, einfaldi, no bullshit tónleikurin er aftur vorðin atkomuligur hjá konsertgangarunum. Við sterkum løgum sum "Leoland", Leys teys" og "Disiplin", er bólkurin aftur farin í venjingarhølini fyri at skriva hits. Hesi løgini stinga seg burturúr "Stokkhólmssyndrominum", tí at tey eru sannir oyrafangarar, Feit riff og feit niðurløg. Sum vant, er tónleikurin framúr væl spældur, og punk trioin gevur sínum trúgvu áhoyrarum veruligt oyrakrás fyri pengarnar. Útgávan er væl úr hondum greidd. Ljóðið er skitið uppá tann góða mátan. Alt ljóðar rótut uppá ein ruddiligan máta, og enn eina ferð prógvar Óli Poulsen (sum hevur ljóðblandað fløguna), at handverki er í heimsflokki.

## The Sky Is Opening – Guðrið Hansdóttir

**Ein sonn perla frá Guðrið Hansdóttir. Ein fløga sum er løtt at lurta eftir, við góðum løgum, góðum vokalum og lekkrum útsetingum.**



The Sky is Opening minnir nógv um fyrru fløguna hjá Guðrið – hon er bara nógv betri. Talan er óivað um eina ta mest spældi útgávuna í føroysku loftmiðlunum í 2009, og tað kemst ikki av ongum. Fløgan er ein perlurøð av góðum og væl framførdum løgum. Serliga lagið "Stjørnur" er eitt serstakliga fangandi lag, sum hevur verið tráspælt í loftmiðlunum. Síðan eru onnur løg sett í umfar í Kringvarpinum, og hava hesi eisini staðið seg einastandandi væl.

Tónleikararnir, sum spæla saman við Guðrið eru millum teir allar bestu í landinum. Úr rúgvuni kunnu vit nevna Mikael Blak, Leivur Thomsen, Magnus Johannesen, Angelika Nielsen og fleiri onnur.

## Tokyó – Petur Pólsson

**Skaldið, sum áður stóð á odda fyri kult-bólkinum Clickhaze, hevur latið úr hondum sína næstu útgávu. Tokyó er ein útgáva sum er á tremur við kryddi til tónleikanørdin. Spennandi upptøkur, og serstakliga vakrir tekstir. Fløgan er sterkari enn undangangarin "Koma".**



Hóast "Tokyó" sanniliga er myrk og tung, er enn meira spennandi enn "Koma". Hon er stutt sagt, eitt serstakliga flott handverksligt avrik av Petur & Co.

Lagið "Svart Klæði Fyri Vindeyga" er rættiliga umboðandi fyri útgávuna "Tokyó". Eitt tungt, grungekent lag, við týðiligum íblástri úr 90unum. Petur hevur sín heilt egna sangstíl, sum ikki hóvar øllum. Men á fløguni kemur Petursa tilgongd til vokalin til sín rætt. Tú kanst næstan ikki ímynda tær eina klokkuklára rødd, sum hevði riggað á útgávuni. Tó so, hevur Petur fingið nakrar songkvinnur at leggja ein ljósan kontrast til hansara myrku rødd. Lagið "Gjóstur" er eitt fantastiska dýrabart lag, við einum vøkrum, lívsjáttandi teksti, og einum feitum niðurlagið, sum setur seg eftir í høvdinum.

Tónleikastílurin kann kanska lýsast best sum ein samanrenning millum tungan rokk/grunge/noise tónleik. Bogi á Lakjuni hevur framleitt fløguna, og er hann sloppin væl frá hesum arbeiði. Fleiri alternativir mátar at upptaka tónleik uppá eru tiknir í nýtslu, og riggar hetta heilt væl.

Hóast "Tokyó" ikki er tann fløgan, sum hevur verið mest spæld í miðlunum, so er hetta ein av teimum týdningarmiklu fløgunum, sum hoyrir heima í savninum hjá einhvørjum tónleikanørdi.

# BESTA SONGKVINNA

## Anna Katrin Egilstrøð



**Oddakvinnan í spennandi bólkinum Valravn er um at fáa sligið sítt navn fast millum bestu songkvinnurnar í Danmark. Við hennara ráa og ótæmda sangstílið er ongin ivi um, at hon telist millum allarbestu songkvinnur í Føroyum.**

Anna Katrin Egilstrøð er eitt frískt lot innan føroyskan tónleik. Saman við bólki sínum er hon við til at menna eitt "sound" sum ikki er hoyrt áður. Tá hon syngur ljóðar hon vill og treisk. Hon syngur sera kensluborið, og heldur áhoyraran vaknan við sínari serligu úttalu og sínum serligu fraseringum. Hennara pallframførslur eru eyðkendar við teatralskum ískoytum. Hon livur seg inn í tónleikin við sínum rørslum, og er hetta nakað sum hevur verið nógv róst av ummælarum í Danmark.

## Eivør Pálsdóttir

**Diva´in innan føroyskan tónleik. Ikki er neyðugt at brúka nógva orku uppá at lýsa dygdirnar hjá Eivør, tí tær kenna allir føroyingar væl. Hon er enn ung, og hevur hóast hetta verið ein týdningarmikil partur av føroyskum tónleiki í eini 10 ár.**



Longu um aldarskifti var Eivør Pálsdóttir eitt kent navn í tónleikahøpi í Føroyum. Alt, sum hon nært við, gjørdist til gull og jaligu lýsingarorðini vildu ongan enda taka. Soleiðis er enn í dag. Hon er nú ein garvað songkvinna, sum meistrar eina rúgvu av vokaltekniskum finessum, sum ongin annar kann erpa sær av. Hennara rødd rúmar eina fantastiska breidd, og hon kann syngja sum tann mildasta smágentan og brøla sum tað svakasta trøllið. Eivør hevur ferð eftir ferð bergtikið ummælarar og konsertgangarar, og tykist flyta seg alla tíðina. Tá hon framførdi nýggjan tónleik til "Føroyar Móti Krabba" hoyrdist enn ein nýggj síða av henni. Hesuferð var tónleikurin harðari, rokkuttari og meiri farligur, enn vit hava hoyrt hann leingi.

Við løgum sum "Nú Brennur Tú í Mær", "Elisabeth Maria", "Daylight", "Mær Leingist" og fleiri øðrum, hevur Eivør fyri langari tíð síðan sett sítt týðiliga fingramerki á føroysku tónleikasøguna.

## Guðrið Hansdóttir

**Guðrið Hansdóttir vann Planet heiðurslønina fyri "Besta songkvinna" á Planet Awards í fjør. Guðrið er eitt stjørnuskot á tónleikahválvinum, og er nú farin út um landoddarnar við sínum tónleiki.**

Guðrið Hansdóttir hevur verið virkin í tónleiki í fleiri ár. Hon gjørdi nøkur sprell við "Isadora and the Rebels", sum varð ein bólkur hon spældi við fyri nøkrum árum síðani. Tey luttóku eitt nú á GBOB, og tá vóru tað fleiri í løgdu merki til hesa vøkru songkvinnu, við teimum sprøklutu kjólunum. Men bólkurin sindraðist og Guðrið helt áfram at mennast sjálv og luttók í Singer/Songwriter kappingini í Hotel Hafnia á sinnið, og gjørdist tað enn meira týðiligt, at her spælir ein genta sum hevur nógv uppá hjarta.

So við og við mentist hon, og í dag er hon vorðin ein av allarbestu songkvinnum í landinum. Hennara absolutta styrki er, at hon hevur eina sera góða tulking av tekstinum hon syngur. Framførslur hennara verða hildnar uppi av teimum góðu frásagnunum og tí melodiøsa tónleikinum sum hon skrivar. Hon vinnur hjørtur til hvørja konsert hon spælir.

## Lena Andersen

**Lena er ein hin mest inniliga songkvinnan, ið vit eiga. Hon kann nema við hjartastreingir tínar, bara hon trínur á pallin. Hon hevur ein vakran, melankolskan tóna og saman við einfalda tónleikinum gongur alt upp í eina hægri eind.**



Lena hevur bjóðað føroyingum eina ørgrynnu av hittum seinastu árini. Hon er vorðin fólkaogn, og hennara tónleikur verður heilt nógv spældur í føroysku loftmiðlunum. Við løgum sum "Oh, my lady", "Can´t erase it", "Let your scars dance" hevur hon neglt seg fasta í sinninum á mongum føroyingum. Hon syngur einamest á enskum, og skrivar eminentar og viðkomandi tekstir. Hennara tónleikur kann helst lýsast sum Singer/Songwriter tónleikur.

Fyri fløguna "Let Your Scars Dance" fekk Lena tvær heiðurslønir. Dimmalætting og Planet Awards heiðraðu útgávuna við at skýra hana "Besta Útgáva 2007".